– Dysturin týskvøldið var nakað av tí størsta, sum eg havi verið við til sum fótbóltsspælari.

Herbert í Lon Jacobsen, B36-verjuspælari, eftir sigur á Birkirkara

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801



# B36 kann skora tríggjar milliónir

**Eydnast tað B36 at koma víðari í Champions League kappingini, fær felagið eina inntøku upp á umleið tríggjar milliónir krónur burtur úr europeisku luttøkuni**

FÓTBÓLTUR
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo



*B36 fær nógvar pengar burtur úr europeisku luttøkuni, um tað eydnast at koma víðari í Champions League kappingini*

Gongur tað væl ítróttarliga í europeiskum fótbólti, so kastar tað eisini pengar av sær. Tað vita øll feløg kring Europa, og nú fær B36 eisini smakkin av tí.

Eingin fótbóltskapping gevur so nógvar pengar sum Champions League, og nú B36 stendur til at koma víðari í kappingini, fara krónurnar veruliga at trilla niður í kassan.

– Um vit klára at koma víðari til næsta umfar í Champions League, so kunnu vit rokna við at fáa umleið tríggjar milliónir krónur burtur úr luttøkuni, sigur Kristjan á Neystabø, sum stendur fyri rakstrinum av besta liðnum hjá B36.

– Tað kemur væl við hjá felagnum og styrkir okkum, men vit fara at halda fram eftir sama leista og fara ikki bara at brúka pengar, tí vit fáa hesa inntøkuna, sigur hann

## Høgt grundgjald

B36 fær eitt grundgjald fyri at spæla við í innleiðandi kappingini til Champions League, og hetta grundgjald, sum er galdandi fyri øll tey innleiðandi umførini, er á 1,2 milliónir krónur.

Síðani fær B36 eitt gjald fyri hvørt innleiðandi umfar, sum felagið spælir í. Hetta gjaldið er umleið 600.000 fyri hvørt umfar. Tað vil siga, at B36 við at spæla í 1. umfari av Champions League fær 1,8 milliónir krónur, og klárar liðið at koma víðari til annað umfar, koma 600.000 krónur afturat í kassan.

## Sjónvarpsrættindi

Harafturat fært B36 eisini pengar fyri sjónvarpsrættindi, og tann upphæddin gerst serliga spennandi í næsta umfarinum, tá ið mótstøðuliðið verður turkiska Fenerbahce.

– Turkaland er eitt stórt land, og tað er eitt av londunum, sum gevur nógvar pengar fyri sjónvarpsrættindi. Har fáa vit fleiri hundrað túsund krónur burturúr, um tað eydnast at koma víðari, sigur Kristjan á Neystabø.

Um B36 klárar at verja 3-0 leiðsluna ímóti Birkirkara á Tórsvølli í næstu viku, kann felagið síggja fam til eina inntøku upp á umleið tríggjar milliónir krónur.

– Tað er gott at fáa pengar inn, men vit fara ikki at broyta nakað kring 1. lið, tí har koyrir alt rættiliga optimalt sum er. Hinvegin kemur tað væl við at hava pengar á kistubotninum, um tíðirnar broytast, sigur Kristjan á Neystabø.

# 30 súkklarar fara at kappast um bláu troyggjuna

**Í næstu viku verður súkklukappingin Statoil kring Føroyar hildin. Í ár verða 30 luttakarar við í kappingini, og ein føroyskur súkklari er millum favorittarnar**

SÚKKLING
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

30 súkklarar verða við í stóru súkklukappinginin Statoil kring Føroyar, sum verður hildin frá 19. til 23. juli. Fyrireikararnir eru væl nøgdir við talið á luttakarum, sum er millum tað hægsta nakrantíð. Í 200 vóru flest luttakarar við í kappingini, tá vóru 30.

Millum favorittarnar í kappingini hesaferð er føroyski súkklarin Gunnar Dahl-Olsen, sum hevur fyrireikað seg væl til kappingina. Hann hevur verið í feriu uttanlands, men part av tíðini hevur hann brúkt til venjing, og hann er væl fyri til kappingina í næstu viku.

Talan er um eitt stórt tiltak, og eini 60 hjálparfólk eru við til at avgreiða tey ymsu umførini í kappingini. Súkklað verður ymsastaðni kring landið, og teinarnir eru ymiskir í longd.

## Illgrunin um doping

Tour de France súkklukappingin í ár varð skakað av stórari dopinggølu, og umdømið hjá súkkluítróttinum er ikki tað besta í løtuni. Hetta er eisini nakað, sum føroyski súkklarar merkja.

– Tað er ikki bara stuttligt at vera súkklari í hesum døgum, tí fólk hava ein støðugan illgruna um, at allir súkklarar eru dopaðir, men soleiðis er støðan als ikki, sigur súkklarin Sverri Mohr Edvinsson.

Statoil kring Føroyar súkklukappingin hevur einki serskilt dopingeftirlit, men Ítróttarsamband Føroya kann taka royndir til kappingina, og stórur partur av føroysku landsliðssúkklarunum eru kannaðir, og har eru eingi ólógilig evni at hóma.




*Alt er klárt til at fara undir Statoil kring Føroyar súkklukappingina. Fyrireikararnir eru væl nøgdir við, at 30 súkklarar eru við í kappingini hesaferð*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## EB/Streymur manglar álopsessið

**Sorin Anghel verður ikki førur fyri at spæla ímóti ÍF í kvøld eftir snuddin hann fekk í Gøtu sunnudagin. Nýggjur spælari verður eftir øllum at døma við í hópinum hjá EB/Streymi**

EB/STREYMUR-ÍF
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Í kvøld spælir oddaliðið í Formuladeildini seinasta dystin fyri summarsteðgin. Dysturin hjá EB/Streymi verður ímóti aftasta liðnum í deildini, ÍF.

Sunnudagin vann EB/Streymur trupla útidystin í Gøtu, og nú kunnu teir seta punktum við einum heimasigri á ÍF.

EB/Streymur má verða álopsspælaran Sorin Anghel fyriuttan til dystin í kvøld. Sorin noyddist av vøllinum í Gøtu við einum snuddi í beininum, og hann er ikki klárur at spæla, hóast skaðin ikki er so álvarsamur, sum hann fyrst kundi tykjast.

Sorin hevur skotið seks mál fyri EB/Streym í ár, og hann hevur havt stóran týdning fyri liðið. Hinvegin hevur Arnbjørn Hansen skotið eitt mál meira enn Sorin, og Hans Pauli Samuelsen er toppskjútti við 9 málum. Teir spæla báðir í kvøld.

Rafael Kwiecinski noyddist eisini at gevast at spæla í Gøtu, men hann er við í hópinum í kvøld, og tað skal álopsspælarin Jørgin Meitelberg eftir øllum at døma eisini verða.

Hjá ÍF er so at siga sama fólkið tókt, sum spældi á Toftum sunnudagin. Alexander Jovevic er leikbannaður til í kvøld, men Eyðun Ryggshamar, sum ikki hevur spælt seinastu umførini, er við at koma fyri seg aftur eftir skaða.